HJÁLP!
Vit eru 3 fittir hvølpar, sum ongastaðni hava at búgva! Vit eru ektaðir puddilhundar, 3 vikur gamlir. Um hetta upp á nakran máta fangar tín/tykkara áhuga, so ring til
Elinborg á tlf. 224466

KANINUNGAR
Tveir fittir svartir kaninungar fáast við at avheinta teir.
Tlf. 227604

DVØRGAHAMSTRARAR
latast til djóravin.
Tlf. 316165

TIL SØLU
Ein hann angora marsvínaungi við krúnu til sølu. Hann er myrkabrúnur, reyður og hvítur. Um tú vilt keypa hann,
ring so 452081 ella 224481

KALKUNIR
4 kalkunir: 1 hani og 3 hønur til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 215737

HUNDAHVØLPUR
verður latin djóravini. Hann er 7 vikur, ljósabrúnur og hvítur.
Tlf. 423258/220018

HUNDAHVØLPAR
mamman puddil. Eisini hava vit kettlingar og undulátar.
Tlf. 456094

EIN SERA FITTUR
Border Collie seyðahundahvølpur til sølu, mamman er ektað.
Tlf. 509538 eftir kl. 17

Húsarhaldstól

GRAM KØLISKÁP
Hvítt Gram køliskáp og ein frystiboks í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 322193/218035

TIL SØLU
Brúkt køliskáp til sølu.
Tlf. 319486/260506

AVHEINTAST
Gamalt køliskáp og komfýrur (3 plátur) kann avheintast, um tú hevur brúk fyri tí. Rigga fínt.
Ring 311221/211231

STÁLVASK
(skolivask) til sølu 65 x 40 x 20 cm. kr. 150,-
Tlf. 441964/741964

Innbúgv

EIN GAMAL LENISTÓLUR
til sølu fyri 200 kr. og eitt lítið runt træborð fyri 100 kr.
Ring 317234

EIN GÓÐ BOXMADRASSA
til sølu fyri 500 kr. Stødd 200x140x20 cm við stálboylum og beinum.
Tlf. 313424/215568

SPÍSIBORÐ TIL SØLU
Ovalt myrkabrúnt spisiborð úr træi v/ 6 stólum + 2 eyka plátur til sølu fyri 1500 kr. Myrkabrún reol úr træi í 3 portum v/ skuffum og glasskápum. Allir 3 partar til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 311977/511977

SKRIVARABORÐ ÚR TEAK TRÆ
»Labofa« fæst við at avheinta tað. Sær gott út.
Tlf. 312292/512292

KLÆDNASKÁP
Klædnaskáp, TM Line Profil, hvítt, 1. floks, H:230 B:238 D:60, 4 skjúthurðar, harav 2 jalousi og 2 við spegl, 8 hillar, 2 tráðkurvar og 6 skuffur. Yvirskáp við hill báðu megin og 4 jalousi skjúthurðum. Sera væl viðfarið. Nýprísur 12.000. Til solu fyri 3.500. Kann síggjast á www.vesenberg.fo/skap.htm
Tlf. 322432

VEGNA FLYTING
er fylgjandi til sølu: leðursofa 3+2, lútað sofaborð, skenkur v/ yvirskápi, lútaður, lútað spisiborð v/ 6 stólum, lútað vitrinuskáp. køksborð 8 kt. hvítt v/ 2 plátum, 12 pers., 2 Herstal lampur v/ bláum skermi, køkslampa, klædnaskáp v/ 3 hurðum + 4 skuffur, kommoda, hornatelduborð, sjónvarpsborð, telduborð og frystiskáp.
Tlf. 224919

VEGNA PLÁSSTROT
er eitt køliskáp, 1/2 ára gamalt, til sølu.
Tlf. 371045

KOMBINERAÐ SONG
skáp og skrivaraborð til sølu fyri 500,- madrassa fylgir við.
Tlf. 444787

TIL SØLU
3 mans sofa og stólur til sølu. Stríput stof og olja furutræ.
Tlf. 507576/442120

BRÚKT SPÍSISTOVUBORÐ
+ 6 stólar, brúkt reolsystem, leðurmøblar (rosalitað) 3 + 2 + 1 bíliga til sølu.
Tlf. 219103

TIL SØLU
Antik heingilampa til sølu.
Tlf. 318406

TIL SØLU
Spisi/køksborð úr furu selist fyri 250,- stødd 140 x 80 cm.
Tlf. 311221/211231

RUNT BORÐ
Runt borð og 4 stólar. Skal pussast og »shinast«, til sølu fyri kr. 300,-
Tlf. 310649

ABC-REÓLIR
9 stigar (h. 179 cm). 29 hillar (b. 78,5 cm.). 5 hillar (b. 40 cm). 1 borðpláta (75 x 121) til sølu fyri kr. 800,-
Tlf. 310649

TIL SØLU
Stórt myrkt flott sofaborð v/ stórum kaklum 87 x 148, 750,- kr. Eitt hvítt, høgt urtapottaborð v/ marmorplátu 140 kr. og 3 hvítir gamlir køksstólar 150 kr. pr. stk. Sjáldsamur, stórur messingmortari, kr. 1.000,-
Tlf. 511580/521640 ella 321640

HORNASOFA
Ein grá velour hornasofa, 2 ára gomul, sær út sum spildurnýggj, til sølu fyri kr. 5.000,- Nýprísur kr. 10.000,-
Ring 457230 aftaná kl. 16

Leikur

POKEMON KORT TIL SØLU
74 glins og 50 stjørnu til sølu fyri 499 kr.
Tlf. 271085

Lutaseðlar

VINNINGAR
Frá Føroya Riðingarfelag. Vinningar á atgongumerkinum frá Djóradøgunum.
Nr. 1 vinningur (lamb) nr. 965, nr. 2 vinningur (gás) nr. 293.
Tarvin vann nr. 7 (Tórshavnar Skipasmiðja). Vinarliga ring 222222.
Føroya Riðingarfelag

Pløgg

BRÚÐARKJÓLI
Innflutturur úr Texas USA. Er at síggja í vindeyga í Skálabúðuni, Tórshavn.
Tlf. 221161/318700 eftir kl. 17

COWBOYBUKSUR TIL SØLU
2 pør av merkinum Bad + Mad HipHop, einir eru svartir og einir eru bláir, ongantíð brúktir, stødd 152/12 ár.
Tlf. 322193/218035

TIL SØLU
Hosur til føroyskan búna til sølu.
Tlf. 318406

MáF
Til stóra ólavsøkuleikin 2004 taka vit ímóti brúðarkjólum, øðrum kjólum, toyi, stores, øllum, ið seymað kann verða.
Ólavsøkuleikurin 2004
v/ Leikarafelag Føroya og MáF, undir Pisuvarða 2 í Havn
MáF

FØROYSKUR KVINNUBÚNI
við møtli til sølu fyri 16000 kr. Stødd 42. Sum nýggjur, einans brúktur tvær ferðir. Silvurið er hestaskógvur og fyriklæði og turriklæði úr bláum silki.
Tlf. 217908

Samband

SAMBAND YNSKIST
Kvinna síðst í 40'unum ynskir samband við einligan mann í hóskandi aldri, sum ikki nýtur stórvegis av spiritus, er at líta á og sum kann vera góður við meg. Mynd ynskist sjálvandi.
Tagnarskylda. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1840/6

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
LÍF

Súkklur

SÚKKLA TIL SØLU
Damusúkkla »Rocky« 7 gear, til sølu.
Tlf. 265801

SUZUKI 600 GSXF
til sølu, koyrt 18000 km, svørt, sær út sum nýggj, 47.000 kr. Klæðir og hjálmur kann keypast við.
Tlf. 272093

WILDSTAR 1600 cc
til sølu um hóskandi boð fæst. Onnur súkkla kann møguliga ganga inn í handilin. Myndir kunnu mailast.
Tlf. 221122

SKUTARI
Yamaha Neos 1/2 ára gamal, koyrt 5 km, til sølu fyri 18.000,-
Tlf. 318090/284010

DERBY SENDA SM-CROSS
ella Aprilia RX50 ella MX50 ynskist til keyps fyri sámuligan prís. Áhugað biðjast vinarliga ringja
tlf. 310505 eftir kl. 18

TIL SØLU
Skutari til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 580473/448349

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Suzuki intruder 800, árg. 1994, km 10.000.
Tlf. 316570

VEGNA KEYP AV BILI
selji eg skutara mín. Hann hevur koyrt 4.750 km, er í góðum standi og væl viðfarin. Prísur uml. 13.000 kr.
Áhugað ringið 253396

YAMAHA FZR 1000 TIL SØLU
Súkklan er renoveráð og koyrir sera væl. Prísurin er til at diskutera. Ring á
210784 og hoyr nærri

CYCLEPRO
fjallasúkkla til vaksin, bíliga til sølu.
Tlf. 447840/747840

YAMAHA FS1
knallert, við skivubremsu framman. Er í góðum standi og til sølu.
Tlf. 251507, aftaná kl. 17

SKUTARAR
Skutarar til sølu. Annar kann koyra, hin til eykalutir.
Tlf. 219988

BARNASÚKKLA
5-7 ár, merki Winther, í góðum standi, til sølu fyri 800,-
Tlf. 219988

YAMAHA FS1 KNALLERT
til sølu. Súkklan er í góðum standi. Myndir kunnu sendast pr. teldupost.
Tlf. 272236

SKUTARI TIL SØLU
Ein Aprilia til sølu um hóskandi boð fæst. Er í góðum standi og sær gott út.
Tlf. 314845

APRILIA RX50
er í sera góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 267750

TIL SØLU
Ein Aprilia MX til sølu. Krevur ongar ábøtur.
Tlf. 254445

HEVUR NAKAR EIN
Brúktan hjálm til skutara? Vinarliga ring
Tlf. 263452

RX50 TIL SØLU
Sær gott út og koyrir sera væl, stendur bara og skal tí seljast. Eykalutir fylgja við.
Tlf. 509383

SUZUKI 600 GSXF
til sølu, í góðum standi, koyrt 18.000 km, árg. 93, jakki, buksur, handskar og hjálmur kann keypast við. Má síggjast.
Tlf. 272093

SKUTARI
Yamaha Neos 5 ára gamal til sølu fyri 10.000,- ella hægsta boð yvir.
tlf. 512530 eftir kl. 17

Teldur

TELDUSKERMUR
Brúktur telduskermur ynskist bíliga til keyps.
Tel. 424437 fart. 508508

TELDA TIL SØLU
AMD Duron 750MHZ, 144mbram, 37GB harddisk,við fylgir ein 17" skermur, Knappaborð og mús. Prísur 2000 kr.
Tlf. 221051/315062

GÓÐ TELDA BÍLIGA TIL SØLU
2.4 GHz, 1024 Ram, 80 GB, DVD-brennari, 17" skerm, TV-Tuner, modem, tráðleyst tastatur og mús. Ring og hoyr nærri á
tlf. 257149

TELDA TIL SØLU
AMD Athlon 1600+ XP, 256 MB DDR-Ram, GeForce 2 MX 440 Grafikkkort, 100 GB HDD (60GB+40GB), 3x Firewire PCI kort, 17" Dell skerm, Microsoft tráðleyst keyboard + tráðleys/optisk mús, 16x10x40 CD-brennari, 16x DVD-rom, Soundblaster AWE 128 Ijóðkort, 10/100 Mb netkort, 56 k v.90 PCI modem, Philips hátalarar, diskettudrev og ein Epson litprintari. Til sølu fyri 6.000 kr. Ring ella skriva til
bardurhj@hotmail.dk, Tlf. 0045 30612941

TIL SØLU
10 Telduspøl Theme park World, Dune 2000, Keeper 2, Te f.a. Premier league Star, Championship manager 3, uangsters, Thef Tomb rider 3, Driver, Supreme snowboarding, 1 spæl fyri 60 kr. øll fyri 500 kr.
Tlf. 310141

PLAYSTATION II SPØL
5 stk spøl til Playstation 2 eru til sølu: The Scorpion King, Capcom VS. SNK 2, Resident Evil Survivor 2, WWF Smack Down Just Bring It, og Splinter Cell, fyri 250 kr/stk ella øll fyri 1000 kr, tey eru góð at spæla við.
Tlf. 509282/316646 (spyr eftir Sigmund)

PLAYSTATION II TIL SØLU
2 mór. gamal við 2 joystikkum, memorycard og 4 spøl. Fifa 2004, Brokensword, Lotr, Total club manager 2004. Prísur 2.500,-
Tlf. 250621

SCANNARI
Ein lítið brúktur Canon CanoScan D660U við 1200 dpi upploysing. Til sølu fyri 600 kr. Alt uppruna tilhoyr er við.
Tlf. 443211

BLEKK PATRÓN
til HP 350l og HP 350 CBi óbrúkt, til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 0045 86428627/0045 26747474

Tónleikur

SURROUND HÁTALARAR
2 Dali Blue series 8008 Front hátalarar, 2 Yamaha bakhátalara 300 watt, 1 Yamaha centerhátalari 400 watt, 1 Yamaha Subwoofari við innbygdum 250 watt forsterkara. Nýprísur 3. juni 2002: 23.370 kr. Til sølu fyri 14.000 ella boð.
Tlf. 584487 juulurin@online.fo

ELDRI GRAMMOFONPLÁTUR
útvarpstól og grammufonspælarar ynskjast til keyps.
Tlf. 593491

PLÁTUSPÆLARI
ið kann spæla 78 plátur ynskist til keyps.
Tlf. 593491

KNAPPHARMONIKA
Nýggj Svedband við 96 bassum og ein læraubók, til sølu fyri 8.000,- kr.
Tlf. 218522/448222

BÝTI UM
Eg eigi flogur og LP – danskar og útlendskar. Eg leiti eftir føroyskum flogum.
Tlf. 0045 86448627/0045 26747474

Út- & Sjónvarp

VIDEO
Eitt eldri Philips video bíliga til sølu.
Tlf. 220955

PARABOLSKIPAN TIL SØLU
Hevur motorstýring, analogan og digitalan tunara + dupult høvd. Stativ fylgir við.
Tlf. 218385

TIL SØLU
Tandberg sølvsuper 12 og eitt sølvsuper 10, hátalarar fylgja við, eru sum nýggj.
Tlf. 519613

TIL SØLU
1 forsterkari, 1 radio, 1 bandupptakari, 2 hátalarar, bíliga til sølu.
Tlf. 421074/503074

Ymiskt

TIL SØLU
Radiatorur einkultur L190-H60 til sølu.
Tlf. 319223

TAXAKOYRING
Frá 1. juni 2004 byrji eg at koyra taxa í Vágum.
Tlf. 221866 Frank Davidsen

STÓRT TILTAK
Stórt tiltak verður í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 5. juni klokkan 15. Mat- og bommtombola. Kaffisøla. Søla av lutaseðlum har millum annað at vinna verða kurvar fyltar við ymiskum góðum, sodavatnskassar, gávukort á 500 krónur, Apex-ferðaseðil og mangt annað gott. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

ÚTHURÐ
hevður nakar eina úthurð at lata mær, skal bert brúkast í 6 mánaðir so útsjónd hevur onki at siga.
Tlf. 251450

YNSKIST TIL KEYPS
1. stk vindeyga 60 x 100 v/termorúti ynskist.
Tlf. 251450

GRUNDØKI
Grundøki í Hoyvík ynskist til keyps stødd 500 kvm. skjótast tilber.
Vinarliga ring tlf. 214133

FELAGSSKÚLIN Á OYRARBAKKA
8.a skipar fyri stórum summartiltaki á skúlaplássinum sunnudagin 6. juni kl. 16 til frama fyri uttanlandsferð. Á skránni verður hoppiborg - ponyriðing - tombola - søla av brúktum lutum og bókum - fiskibrunnur - kaffisøla - vaflur - lagkøkur og bróstsukur.
8A á Felagsskúlanum

STÓR SÍL
Nú ber til at fiska stór ælabogasíl (1-5 kg.) á Nesvatni. Nærri fæst at vita á
tlf. 447565 ella 260887

FLYTTEKASSER
Store flyttekasser, let brugte, sælges 15 kr. stk.
Tlf. 322951

TIL SØLU
20 fót og 40 fót containarar til sølu. 120 Tlf. kort til sølu.
Tlf. 270427

TIL SØLU
Nakrar 5-krónur frá 1969 – trupult at fáa hendur á í dag – til sølu fyri 75 kr. pr. stk.
Tlf. 212289

GRÓT
Grót fæst við at betala koyringina.
Tlf. 216030

NOKIA 7250i
Smart fartelefon 6 mør. gomul. Hevur ma. kamera, litskerm, orðabók, mms, polyfoniskar ringitónar og radio. Prísur 2000
Telefon +45 21698550 ella dac@nork.auc.dk

N-GAGE SPÆLITELEFON
(lítið brúkt) til sølu og eitt memory kort.
Tlf. 252097/590010

SONY ERICSSON T310
til sølu, riggar fínt, ladari og infrareytt fylgir við. 1.000,- kr. Vit kunnu eisini tosa um prísin.
Tlf. 509480

TIL SØLU
Ruskstativ í góðum standi til sølu.
Tlf. 319486/260506

ATGONGUMERKIR TIL G FESTIVALIN
Eru at fáa við at ringja til mín (Vikuskiftispass). Vinarliga ring
Tlf. 229882

24 DUNKAR AV CASCO
Pistol håndværkerskum til sølu fyri 50 kr. stk.
Tlf. 270427/312981

GRÓT FÆST
fyri 300 kr. pr. less, keyparin má lessa sjálvur.
Tlf. 270427

RULLUSKOYTUR
til sølu av merkinum »Atlanta XP5« stødd 44, næstan óbrúktar.
Tlf. 267282/317330, Bjartur

TIL SØLU
Grundstykki í Øravíkarlið til sølu.
Áhugað ring 371926/210926

SEYMING
Vil tú seyma mær ein vest til føroyskan búna, so ring.
Tlf. 269074

TIL SØLU
Ein yvirlivilsisdrakt/turrdrakt til sølu – óbrúkt. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 268273

POLAR 700
Thule takboks, árg. 2003 brúkt einaferð, takboylar fylgja við, til sølu.
Tlf. 222684

VIÐFESTISVOGNUR
við tveimum akslum av merkinum Brenderup til sølu. Lastar 950 kg.
Tlf. 372590 eftir kl. 17

ER TAÐ NAKAR
ið kann selja mær eina fartelefon Ericsson T295 ella T66.
Tlf. 213303

SUNDA PENSIONISTAFELAG
Útferðin í Vágoynna verður sunnudagin 13. juni. Bussur koyrir frá Shellstøðini við Streymin kl. 9.30 Tekning á tlf. 423357-422055-423056 í seinasta lagi týsdagin 8. juni.
Nevndin

SMS CHATBOARD
óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx model, góð til m.a. SMS, Telefonbók v.m. Fyri 150 kr.
Tlf. 0045 86428627/0045 26747474

UPPLADARI
til Ericsson 626, óbrúktur við antennu til sølu fyri 75 kr.
Tlf. 0045 86428627/0045 26747474

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

RIMMAR EM-KAPPING

Tað er ikki long tíð, áðrenn EM-kappingin í fótbólti fer á rull. Ivaleyst er spenningurin undan hesum stórur hjá flestu fótbóltshugaðum føroyingum, men nú kann hesin gerast enn størri.

Saman við Kiosk Steinatún fer Sosialurin nevnliga at skipa fyri einum EM-spæli, har hópur av góðum vinningum standa uop á spæl. Og vinnarin fær einki minni enn eina fótbóltsferð eftir egnum ynski í Europa, soleiðis at til ber at vitja hjá júst tí liðnum, sum liggur tínum hjarta nærmast.

Hjá luttakarunum ræður her um at gita, hvussu útfallið í teimum 31 dystunum í EM-kappingini verður. Hetta verður gjørt við at fylla út veddingarseðlarnar, sum verða at fáa í blaðnum undan og undir EM-kappingini, og síðani skulu hesir sendast inn. Men fyrst skal liðið ella liðini hjá tær teknast til kappingina við niðanfyristandandi haldaralepa.

Eru ivamál, ber altíð til at ringja og spyrja seg fyri, og skal hetta gerast á **tlf. 22 01 06**

VINNINGARNIR

Vinningarnir, sum verða latnir besta veddaranum, eru hesir:

1. Ein fótbóltsferð eftir egnum ynski til dyst í Europa. Latin av MB-Tours
2. Ein ferð til dyst millum FCK-Brøndby, latin av MB-Tours
3. Ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways
4. Gávukort frá Føroya Bjór áljóðandi 1.500 kr.
5. Eitt gávukort frá Thomas Dam ítrótti á 1.000 kr.
6. Ein døgurði fyri tvey á Hotel Føroyum
7. Árskort frá HB
8. Árskort frá B36

REGLUR FYRI EM-SPÆLIÐ

- Tekningarlistin til stóru EM-kappingina í fótbólti verður at fáa í Sosialinum. Ynskir tú at taka lut í kappingini, verður seðilin niðanfyri útfyltur og sendur inn.
- Kostnaðurin fyri luttøku er 100 kr. fyri hvørt liðið. Hvør luttakari kann væl hava fleiri lið, og skulu hesi tá navngevast við nummari. T.d. Hans Hansen 2. Luttakarin hevur tá sjálvur ábyrgdina av, at navnið á liðnum er rætt útfylt, tá veddingarseðlar verða sendir inn. Eisini tey, sum taka lut við einum liði, skulu útfylla teigin til nummarið, sum tá bert er 1.
- Luttakugjaldið skal flytast á konto í peningastovnunum. Antin á 6460-168.583.1 ella á 9181-141.977.5. Tilmeldingin er galdandi, tá vit hava skrásett inngjaldið. Navn á liði skal tilskilast á inngjaldinum.
- Í kappingini verður spælt 1x2. Sum dømi kunnu vit nevna dystin, Danmark-Italia. Roknar tú við, at Danmark vinnur, skrivar tú 1. Heldur tú at javnleikur verður úrslitið, skrivar tú x, og um tú heldur, at Italia fer at vinna dystin, skrivar tú 2. Soleiðis krossar tú av allar 31 dystirnar í kappingini. Tann spælarin, sum hevur gitt flestar dystir rætt, vinnur kappingina.
- Fimm umfar verða í kappingini, og verða veddingarseðlar fyri hvørt umfarið sær at finna í Sosialinum, har ein veddingarseðil verður fyri hvørt umfarið í kappingini. Fyri hvørt umfar skulu luttakararnir fylla út veddingarseðilin og senda hann inn innan evstamarkið, sum er prentað á seðlinum. Einans seðlar, *sum eru klipptir úr Sosialinum, verða roknaðir sum galdandi.* Er talan um avrit av seðlum, verða hesi ikki tikin við.

Evstamark fyri tilmelding er leygardagin, 5. juni, og eiga bæði luttøkuseðil og gjald at vera okkum í hendi innan ta tíð, um tilmeldingin skal verða galdandi.

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn

Fornavn _____
Eftirnavn _____
Føðingardagur _____
Lið nr: _____
Bústaður _____
Postnr. og staður _____

Sosialurin & Kiosk Steinatún